## Arbeiðstíð hjá fólkaskúlalærarum

### Sáttmálin millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið

Í sáttmálanum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið er ásett, at føroyski lærarin skal undirvísa 27 tímar um vikuna. Hvør undirvísingartímin er 45 minuttir, so talan er í klokkutímum um 20 tímar og eitt korter um vikuna. Arbeiðstíðin hjá lærarum er, sum hjá flestu alment settu, 40 tímar um vikuna. Lærarar hava frítíð eftir løgtingslóg um frítíð, t.e. 5 vikur um árið. Aftur at tí eru samanlagt umleið 2 vikur við halgidøgum og mishalgidøgum um árið.

Lærarin stendur við pultin í 198 dagar um árið, t.e. í 39,6 vikur. Partur av teimum 27 undirvísingartímunum verða brúktir til niðurskurð fyri rætting, leiðslu o.a. Eftir bóklinginum »Ráðlegging Fólkaskúlans«, sum Undirvísingar- og mentamálastýrið gav út í 1999, vóru tímarnir, sum givnir vórðu skúlunum fyri skúlaárið 1998/1999, 16.052 í tali. Av teimum stóðu lærararnir 13.028 við pultin. Verða veruligu tímarnir við pultin roknaðir um til klokkutímar, er talan um 651tímar fyri hvønn fullsettan lærara.

**Arbeiðstíðin hjá læraranum er skipað soleiðis:**

| | | |
|---|---|---|
| Árstímar | 2.080 | [52x40] |
| Frítíð | 200 | [5x40] |
| Halgidagar o.a. | 80 | [2x40] |
| Arbeiðstímar | 1.800 | [2080-200-80] |
| Tímar við pultin | 651 | [27x39,6x(13.028/16.052)x(45/60)] |
| Eftir til fyrireiking, rætting, fundir o.a. | 1.149 | [1800-651] |

Í teimum 651 tímunum við pultin eru eisini teir dagar roknaðir við, har próvtøkur eru og har undirvísingin annars er løgd um. Veruliga talið er sostatt eitt sindur lægri.

### Arbeiðstíðin hjá fólkaskúlalærarum í øðrum londum

Stórur partur av tí peningi, sum brúktur verður til skúlaverk í ymsum londum, verður brúktur til lønir hjá lærarum. Í tí sambandi eru uppgerðir gjørdar yvir, hvussu nógvar tímar, lærari stendur við pultin. Fyri øll tølini geldur, at bara tímarnir, lærarin stendur við pultin, eru taldir við.

| | 1.–6. flokk | 7.–10. flokk |
|---|---|---|
| Háland | 1000 | 954 |
| USA | 958 | 964 |
| Frankaríki | 923 | 660 |
| Ný Sæland | 788 | 869 |
| Týskland | 760 | 712 |
| Føroyar | 651 | 651 |
| Danmark | 644 | 644 |
| Svøríki | 624 | 576 |
| Føroyar *) | 602 | 602 |

*) Arbeiðstímatalið er lækkað samsvarandi 37 tíma arbeiðsviku
Kelda: OECD og Finansministeriet

Í nógvum londum verður býtt millum yngru og eldru flokkarnar, soleiðis at lærari, sum undirvísir eldru flokkunum, undirvísir færri tímar, enn lærari, sum undirvísir yngru flokkunum. Hetta verður tó ikki gjørt í t.d. Danmørk og heldur ikki í Føroyum.

Eftir tølunum sæst, at einasta lond, sum liggja lægri enn Føroyar, eru Danmørk og Svøríki. Føroyski lærarin stendur 7 tímar fleiri við pultin enn danski lærararin, men arbeiðsvikan hjá dønum er 37 tímar um vikuna. Føroyska arbeiðsvikan er 40 tímar um vikuna, t.e. um 8% hægri. Verða tímarnir hjá føroyska læraranum lækkaðir samsvarandi 37 tíma arbeiðsviku, stendur lærarin 602 tímar við pultin.

### Arbeiðstíðin skipað sum ársverk.

Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag gjørdu á jóansøku 1997 semju um, at arbeiðstíðin hjá læraranum skal verða skipað sum ársverk. Undir samráðingunum síðsta heyst, og aftur undir samráðingunum í vár, hevur Fíggjarmálastýrið havt sum krav, at semjan frá 1997 verður hildin. Fíggjarmálastýrið vil hava avtalu um, hvussu teir 1.149 arbeiðstímarnir, lærarin ikki stendur við pultin, skulu verða brúktir.

Hesir tímarnir verða í dag m.a. brúktir til at fyrireika tímarnar, rætta uppgávur, foreldrafundir, lærarafundir o.a. Arbeiðsgevarin hevur lítlan og ongan møguleika at stýra hesum tímum. Skal prátað verða um tímar til nýggjar uppgávur, má greiða fyrst verða fingin á, hvørjar uppgávur lærarin hevur í dag og hvussu nógvir tímar verða brúktir til hvørja uppgávuna.

# Hvør sítt roknistykki

*Fíggjarmálastýrið hevur á síni heimasíðu havt útrokning yvir arbeiðstíðina hjá lærarum. Í gjár kom Føroya Lærarafelag við sínum viðmerkingum til útrokningarnar hjá Fíggjarmálastýrinum*

Vinstrumegin sæst útrokningin hjá Fíggjarmálastýrinum og niðanfyri sæst viðmerkingin hjá Lærarafealgnum.

## Viðmerking til úttalilsið hjá Fíggjarmálastýrinum um undirvísingartíðina

Fíggjarmálastýrið hevur á síni heimasíðu kunning um arbeiðstíðina hjá føroyskum lærarum. Sagt verður, at lærarar undirvísa 651 klokkutímar um árið og hetta er ímillum lægstu tøl samanborið við tøl úr londum, sum Fíggjarmálastýrið hevur útvalt.

Føroya Lærarafelag ger greitt, at stýrið ber rang tøl til almenningin.

**Fíggjarmálastýrið skrivar:**
Tímar við pultin: [ 27x39,6x(13.028/16.052)x(45/60)]=651

Hetta svarar til 22 undirvísingartímar í meðal fyri hvønn lærara

Tølini skulu skiljast soleiðis:

27 er lønartímatalið (sum svarar til 27 undirvísingartímar, á 45 minuttir, hjá lærarum við ongum tímaniðurskurði)

39,6 er vikurnar sum undirvíst verður, hetta svarar til 198 skúladagar

13.028 eru allir pultstímarnir, ið lisnir verða í einari viku

16.052 er samlaða tímajáttanin til skúlarnar um vikuna

45/60 er fyri at umroknað undirvísingartímar til klokkutímar

Allir lærarar vita, at teir skulu undirvísa 27 tímar.

Hetta svarar til 802 klokkutímar um árið.

Um lærari undirvísir í lærugreinum við nógvum rættiarbeiði, ella lærugreinin krevur meiri tíð enn vanligt, ella hann er flokslærari o.a., verður givin ein tímaniðurskurður.

Tað, sum Fíggjarmálastýrið ger galið, er:

1.at siga at tímar til serligan tørv ikki eru pultstímar ella undirvísingartímar og
2.tímaniðurskurðurin fyri leiðslu ikki verður tikin við sum bundin arbeiðstíð. Ein kundi freistast at spurt Fíggjarmálastýrið, um skúlaleiðararnir fyrst skulu undirvísa 27 tímar og so leiða skúlan aftaná!

Roknistykkið hjá Fíggjarmálastýrinum tekur støðið í skúlaárinum 98/99. Roknistykkið hjá Fíggjarmálastýrinum átti at verið:

[27x39,6x(14.886/16.052)x(45/60)]
=744 klokkutímar

14.886: Allir pultstímarnir, ið lisnir verða í einari viku + tímarnir sum verða givnir fyri leiðslu + tímarnir sum verða givnir fyri serligan tørv. (13.028+558+1300)

Hetta svarar til 25 undirvísingartímar í meðal fyri hvønn lærara.

Um hetta er mátin at upplýsa almenningin, so eiga tøl frá Fíggjarmálastýrinum eftir hetta at takast við fyrivarni.

## Partarnir mugu semjast

*Signar á Brúnni heldur tað vera órímiligt av Føroya Lærarafelag at seta fram krav ímóti sær*

DAGFINN OLSEN

Føroya Lærararfelag hevur kravt av landsstýrismanninum í skúlamálum, at hann ger greitt, hvat hann vil við nýggju fólkaskúlalógini. Landsstýrismaðurin, Signar á Brúnni, sigur, at Lærarafelagið kennir hansara støðu í málinum.

Hann sigur, at hann sat í andstøðu, tá lógin kom fyri og at hann vísti á veikleikar og skeivleikar við lógaruppskotinum, tí ein ikki setti upp, hvat ein nýggj fólkaskúlalóg kom at kosta.

– Síðani vartaði ein upp við einum tali, sum eg vísti á fór ikki at halda. Tíverri fekk eg rætt í hesum, sigur Signar á Brúnni, sum viðgongur, at hann situr við trupulleikunum í dag.

### Ikki avtaka lógina

Hann er tó ikki samdur við formanninum í løgtingsins mentanarnevnd, ið hevur mælt til at avtaka lógina.



*Signar á Brúnni, landsstýrismaður*

Fólkaflokkurin eigur formannin í nevndini og Signar á Brúnni vísir á, at Fólkaflokkurin var við til at trýsta nýggju fólkaskúlalógina ígjøgnum, hóast flokkurin var kunnaður um, at lógin fór at kosta meir.

– Men hatta er farið og vit mugu víðari, sigur Signar á Brúnni.

– Spurningurin er, hvat ítøkiligt verður gjørt. Eg havi verið í samband við Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, um viðurskiftini. Verkfallið kann ikki halda fram og eg eri samdur við skúlastjórunum, sum vilja hava enda á arbeiðssteðginum, tí hann er so niðurbrótandi fyri skúlan. Vit hava tikið samstarv upp og embætisfólk hjá Fíggjarmálastýrinum og Undirvísingar- og Mentamálastýrinum hava tosað um málið, sigur Signar á Brúnni.

### Órímiligt

Hann vil ikki siga meira, fyrr enn embætisfólkini hava tosað seg fram til, hvat er gjørligt.

Hann heldur tó vera eitt sindur órímiligt av Lærarafelagnum at koma við einum kravi til sín og hann sigur seg ikki heilt vita, hvat liggur í hesum.

– Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag mugu vísa vilja og gera sítt til, at fáa samráðingarnar ganga, sigur Signar á Brúnni, landsstýrismaður.

## Uppgávan er ikki at langa tøl út

*Hetta metir Signar á Brúnni, sum heldur, at partarnir mugu vísa vilja*

DAGFINN OLSEN

Fíggjarmálastýrið og nú Lærarafelagið hava lagt hvør sína útrokning fram á sínar heimasíður, yvir arbeiðstíðina hjá lærarum.

– Eg dugi ikki at síggja, at tað gagnar at fara út við útrokningum. Uppgávan hjá pørtunum er at seta seg niður og í felag finna útav hesum og skilja hvønn annan. Ikki at langa nøkur tøl út. Mínar royndir eru eisini, at fer ein út og í fjølmiðlarnar við málum, so verða tey ongantíð loyst, sigur Signar á Brúnni, ið heitir á partarnar um at vísa vilja.

### Fundarvirksemi

Í gjár hittust embætismenn hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og Fíggjarmálastýrinum at tosa um støðuna og arbeiðssteðgin.

Í morgun klokkan 10 hevur Føroya Lærarafelag fund fyri álitisfólkum, har støðan verður viðgjørd.





*Bæði donsk og onnur útlendsk tíðindafólk hava víst stóran áhuga fyri fullveldissamráðingunum*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Útlendingar stóran áhuga fyri samráðingunum

*Útlendskir miðlar halda lítið um roknstykkið hjá danska fíggjarmálaráðnum, men samstundis seta teir spurnartekin við føroyska samráðingaruppleggið*

JOHN JOHANNESSEN

Umframt danskir fjølmiðlar, hava aðrir útlendskir fjølmiðlar eisini stóran áhuga fyri ríkisrættarligu samráðingunum.

Hetta sást millum annað á tíðindafundinum, landsstýrið helt á føroysku viðskiftastovuni í Keypmannahavn týsdagin, tá føroyska samráðingaruppleggið varð almannakunngjørt.

Á viðskiftastovuni vóru bæði týskir, svenskir og norskir fjølmiðlar at síggja, umframt teir mongu donsku fjølmiðlarnar og heimsumfatandi miðilin, Assiciated Press.

Felags fyri øll fjølmiðlafólkini var, at tey tóku frástøðu frá tølunum hjá danska fíggjarmálaráðnum, ið vísa á útreiðslur, danski staturin hevur av føroyingum bæði í Føroyum og í Danmark.

Kortini løgdu fjølmiðlafólkini seg nógv efir at fáa greiðu á fíggjarligu viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Tey vildu hava at vita, um Føroyar klára seg uttan blokstuðul og hvussu langa skiftistíð Føroyum nýtist, áðrenn tað ber til hjá okkum at gerast fíggjarliga óheft.

Júst spurningurin um skiftistíð og fíggjarviðurskifti er eisini tað, danskir fjølmiðlar hava lagt seg mest eftir at viðgera dagarnar eftir samráðingarnar. Hetta er bæði gjørt í vanligum redaktionellum tilfari, og eisini í oddagreinum í donsku bløðunum.

Millum annað skrivar oddagreinin í týsdagsútgávuni av Berlingske Tidende, at føroyingar seta fram ov hørð krøv í sambandi við skiftistíðina.

Í tíðindasendingini hjá TV2 týskvøldið og í grein í týsdagsútgávuni av Aktuelt, vísir fíggjarserførðingurin, Martin Paldam, á, at Føroyar kunnu klára seg, um so ríkisstuðulin verður tikin av frá degi til dags. Tískil stuðlar hann donsku stjórnini í útmeldingini um, at Føroyar ikki skulu vænta sær langa skiftistíð.

Oddgreinin í Aktuelt stuðlar eisini útmeldingini frá donsku stjórnini. Hon sigur, at danir sjálvsagt ynskja Føroyar at verða verðandi í ríkisfelagsskapinum. Og eisini sigur hon, at føroyingar eiga at gera sær greitt, at sjálvstýri kostar.

Lesarabrøv í donsku bløðunum eru ikki serliga vinarlig móti samráðingaruppleggi føroyinga. Felags fyri tey øll er, at fólk halda búskaparligu krøvini frá føroyingum vera ov høg.

Heilt greitt sæst í útlendsku miðlunum, at tíðindini um, at føroyingar hava kraft eina skiftistíð, ið kann vara upp til 80 ár, hevur havt keðiliga ávirkan á samráðingarstøðu Føroya. Men tølini hjá danska fíggjarmálaráðnum um, hvat føroyingar kosta dønum, hava heilt greitt ikki verið til fyrimuns fyri donsku stjórnina.

tv•2
Verdens lykkeligest band
Ársins LIVE bólkur '99
Konsert á Hálsi
24. mars



Atgongumerki eru at fáa á Kunningarstovuni í Havn og á flest øllum Shell støðum kring landið
HAVNAR SVIMJIFELAG
Tel 31 98 85
Fax 31 37 27

SANGKAPPING

Skriva ein góðan sang...
...og vinn 10.000 krónur!

Goymir tú eitt lítið tónaskald ella ein spírandi yrkjara innan í tær, er henda sangkappingin uttan iva júst nakað fyri teg!

Øll eru vælkomin at senda inn sangir og løg til sangkappingina, sum er útskrivað í sambandi við fløguútgávu við føroyskum sangarum og tónleikarum.

**Sangkappingin og fløguútgávan eru partur av einum størri tiltaki, sum hevur til endamáls at gera vart við umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum og teirra avvarðandi.**

Hav hetta í huga, tá tú skrivar tín sang ella gert títt lag til kappingina!

Virðislønir verða latnar trimum teimum bestu í kappingini, og er ein dómsnevnd sett at velja hesi millum øll tey innkomnu uppskotini.

Virðislønirnar eru ávikavist 10.000, 5.000 og 3.000 krónur, so tað loysir seg at gera eina roynd...

Vilt tú hava meira at vita, kanst tú vitja heimasíðuna
http://sangkapping.cjb.net
ella senda eitt teldubræv til
sangkapping@sangkapping.cjb.net.

Ikki er neyðugt hjá tær at gera eina studio-upptøku, men send bara eitt kassettuband við sanginum á einfaldasta hátt, t.d. sangur/guitar ella sangur/klaver.

Freistin at lata sangir inn til kappingina er ***31. mars 2000***, og sangir og løg skulu sendast til:

**Vælskapt Brek**
**Postboks 2208**
**FO-165 Argir**

SANSIR · TEL 355 355